## VIRKIN SUM LONGST

Nú verkætlanin OLE2 er at enda, vilja vit eldri borgarar vísa, at tað ber til hjá fólki í rætta aldrinum, at skipa fyri áhugaverdum tiltøkum, um røttu umstøðurnar eru til staðar. Hesar hava vit!

Borgarar í Felagskommununi í Vágunum, Þorkeris- og Sunda kommunum eru vælkomin til tiltøkini á óformellu møtistøðunum í Vágunum dagarnar 10 – 13 mai:

**Týsdagur 10. mai, kl.19:00 í Miðvágs skúla**

**Frásøgn**

Hildur Joensen greiðir frá Hans Kristoffur Joensen bónda, og havanum hann lagði, sum er fyrsti havin i Vágunum.  Havin er fleiri ferðirnar virðisløntur og Hans Kristoffur fekk riddarakrossin fyri sítt arbeiði.

Aftaná er boðið uppá kaffi og prat.

**Mikudagur 11. mai kl. 19:00 í Skúlanum í Sandavági**

**Skemt og álvara**

Filmur um toftirnar á Norðaraleiti og holuna uppi á Reynsatindi, har tað sigst, at bydafólkini hava goymt seg fyri sjóræningjum og hildið vakt. Sjúrður Poulsen hevur gjørt.

Torkil Haraldsen lesur søgu.

Heini F. Petersen hugleiðir.

Aftaná er boðið uppá kaffi og prat.

**Hósdagur 12. mai, kl. 19:00, í Húsmøðrafelagnum í Sørvági**

**Sjavs kapping**

Luttøkukostnaður: kr. 50,00. Vinningar verða latnir.

Kaffimugur at fáa.

**Fríggjadagur 13. mai, kl. 13:00 - 16:00, í skúlanum á Giljanesi**

Politikarar, eldri borgrar og aðrir áhugaðir eru bodnir at luttaka í endabrestinum hjá verkætlanarpartinum NETVERKI.

Við kunning og umrøðu, varpa vit ljósi á møtistøðini.

Skráin:

Lýsing av íverksetingum í OLE2 Netverk, Sveiney Sverrisdóttir, OLE2 verkætlanarstjóri.

Møtistøðini; um kommunanna leiklut, Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu.

Heimavitjanir, niðurstøður í verkætlanini, Hans A. D. Joensen, verkætlanarleiðari, Sunda kommunu.

Virkin sum longst - um skipanina, Hans Jørgensen verkætlanarleiðari, Vágar.

Rørslur - gagn og gleði, Benadikta Ellingsgaard physioterapautur.

"Eldsálin", hvussu verja vit um og stuðla henni, Jegvan Bæk sálarfrøðingur hugleiðir.

Kjak.

Filmur um skúlanæmingar og búfólk á Sýnini.

Northern Periphery Programme 2007–2013
Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future
European Union European Regional Development Fund
OLE2